Fíggjarmálaráðið

Dagfesting: 30.09.2022
Mál nr.: 22/17171
Málsviðgjørt: JEK

Fylgiskjal 1

Javntekstur

Galdandi orðingar í løgtingslógini samanbornar við broyttu orðingarnar í løgtingslógaruppskotinum.

Galdandi orðingar	**Løgtingslógaruppskotið**
§ 1..... 2) Er inntøkan kr. 65.000 ella hægri, men lægri enn kr. 235.000, verða kr. 0 latnar av kr. 65.000 og 15% av restini. 3) Er inntøkan kr. 235.000 ella hægri, men lægri enn kr. 330.000, verða kr. 25.500 latnar av kr. 235.000 og 20% av restini. 4) Er inntøkan kr. 330.000 ella hægri, men lægri enn kr. 800.000, verða kr. 44.500 latnar av kr. 330.000 og 25% av restini. 5) Er inntøkan kr. 800.000 ella hægri, verða kr. 162.000 latnar av kr. 800.000 og 30% av restini.	§ 1, stk. 1, nr. 2 til 5 verða orðaði soleiðis: "2) Er inntøkan kr. 65.000 ella hægri, men lægri enn kr. 265.000, verða kr. 0 latnar av kr. 65.000 og 15% av restini. 3) Er inntøkan kr. 265.000 ella hægri, men lægri enn kr. 370.000, verða kr. 30.000 latnar av kr. 265.000 og 20% av restini. 4) Er inntøkan kr. 370.000 ella hægri, men lægri enn kr. 800.000, verða kr. 51.000 latnar av kr. 370.000 og 25% av restini. 5) Er inntøkan kr. 800.000 ella hægri, verða kr. 158.500 latnar av kr. 800.000 og 30% av restini.
Vísandi til § 54 í samtíðarskattalógini verður skattur teirra, ið umrødd eru í § 25b, stk. 1, smb. § 33, nr. 13) í somu lóg ásettur til 35%. Í tann mun, tey í 1. pkt. nevndu hava skyldu til at rinda inngjald sbrt. løgtingslóg um eftirlønarsamansparing og skatt av eftirløn og rentutryggingum, verður skattur teirra ásettur eftir frádrátt fyri hetta inngjald.	§ 1, stk. 2, 1. og 2. pkt. verða orðaði soleiðis: "Skattur teirra, ið eru fevnd av § 25b, stk. 1, sbr. § 33, nr. 13 í skattalógini er 35%. Í tann mun tey í 1. pkt. nevndu rinda eftirløn, sbrt. eftirlønarlógini ella løgtingslóg um skatt av rentutryggingum, verður skattur teirra ásettur eftir frádrátt fyri hetta inngjald."

§ 2. Persónur, ið er undir fullari skattskyldu sambært reglunum í § 1, stk. 1, nr. 1-5 í skattalógini, og hevur fast tilhald í Føroyum, kann fyri hvørt barnið, ið hann hevur foreldramyndugleikan yvir, draga frá í útroknaða landsskattinum ein barnafrádrátt á **kr. 9.200**, um barnið er undir 7 ár 1. januar í tí álmanakkaári, sum skattsetingin viðvíkur, og ein barnafrádrátt á **kr. 6.500**, um barnið er millum 7 og 17 ár 1. januar í tí álmanakkaári, sum skattsetingin viðvíkur.	Í § 2, stk. 1, 1. pkt. verður "kr. 9.200" broytt til: "kr. 11.200", og "kr. 6.500" verður broytt til: "kr. 8.000".
Skattur teirra, sum nevnd eru í § 1 í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt, er 35% av inntøkuni eftir frádrátt fyri inngjøld sbrt. løgtingslóg um eftirlønarsamansparing og skatt av eftirløn og rentutryggingum, um A-inntøkan stavar frá virksemi umborð á skipi, skrásett í FAS, ella skipi, sum eftir stk. 1, 2. pkt. verður javnmett við skip, ið er skrásett við heimstaði í Føroyum, og sum annars lýkur treytirnar í løgtingslógini um FAS. Inntøka eftir 1. pkt. verður tikin við í skattagrundar-lagið, men í inntøkuskattinum skal loyvast ein frádráttur, sum samsvarar við tann partin av inntøkuskattinum, sum kann verða førdur til ta A-inntøku, sum stavar frá virksemi umborð á skipi, skrásett í FAS. landskassan.	§ 8, stk. 2, 1. og 2. pkt. verða orðaði soleiðis: "Skattur teirra, sum eru fevnd av § 1 í skattalógini, er 35% av inntøkuni eftir frádrátt fyri inngjøld sbrt. eftirlønarlógini, um A-inntøkan stavar frá virksemi umborð á skipi, skrásett í FAS, ella skipi, sum eftir stk. 1, 2. pkt. verður javnmett við skip, ið er skrásett við heimstaði í Føroyum, og sum annars lýkur treytirnar í løgtingslóg um Føroyska Altjóða Skipaskrá. Inntøka eftir 1. pkt. verður tikin við í skattagrundarlagið, men í inntøkuskattinum skal loyvast ein frádráttur, sum samsvarar við tann partin av inntøkuskattinum, sum kann verða førdur til ta A-inntøku, sum stavar frá virksemi umborð á skipi, skrásett í FAS."